ETISKA RÁÐIÐ

# Ársfrágreiðing 2025

Etiska ráðið

Etiska ráðið

Varðagøta 9

100 Tórshavn

Føroyar

Tlf: + 298 219484

T-postur: er@er.fo

www.etiskaradid.fo

Ársfrágreiðingin er teldutøk á heimasíðuni.

Januar 2026

# Innihald


Formæli ..... 5

Um Etiska ráðið ..... 6

- Uppgávan hjá Etiska ráðnum ..... 6
- Setan av ráði og hvør situr í ráðnum ..... 6
- Ráðslimir ..... 7
- Fyrisiting ..... 9
  - Heilsumálaráðið ..... 9
  - Formaður ..... 9
  - Reglugerðin ..... 9
  - Skrivstovan ..... 9

Etisk evni ..... 10

- Berarakanningar ..... 10
- Vitlíki ..... 10
- Raðfestingar í almennum heilsutilboðum ..... 10
- Fosturtøka eftir 12. viku ..... 11
- Virkin deyðshjálp ..... 11

Innkomin mál ..... 12

- Hoyringarmál ..... 12
- Mál frá borgarum o.ø. ..... 13

Virksemi ..... 14

- Ráðstevna: Vitlíki og etikkur í heilsuverkinum og almenna geiranum ..... 14
- Ráðstevna: Raðfestingar í almennum heilsutilboðum: Hvat er rætt og rættvíst at gera? ..... 14
- Etiskar kvøldsetur ..... 15
- Poddar um etikk til miðnámsskúlanæmingar ..... 15

Fakligt samstarv ..... 16

Útgávur og miðlan .......... 16
Ársfrágreiðing 2024 .......... 16
Etiska ráðið í miðlum .......... 16
Heimasíðan .......... 17
Facebook .......... 17

Fundarvirksemi .......... 17

Luttøka uttanhýsis .......... 17

Fyrisitingin .......... 17
Skrivstovuhøli .......... 17
Fíggjarstøða .......... 17

Ætlanir 2026 .......... 18

Samanumtøka .......... 18

# Formæli

Ársfrágreiðingin lýsir virksemið hjá Etiska ráðnum farna árið, hvørji evnir, ráðið hevur arbeitt við, og hvussu ráðið hevur arbeitt fyri at røkka sínum endamáli.

Etiska ráðið hevur í 2025 m.a. arbeitt fyri at økja um almenna virksemi sítt. Tvær ráðstevnur, um ávikavist vitlíki og raðfestingar í almennum heilsutilboðum, eru farnar av bakkastokki, og í oktobur var fyrsta Etiska kvøldsetan hildin. Etisku kvøldseturnar eru ein røð av tiltøkum, sum vera hildnar fyrsta týsdag í hvørjum mánaði í vetrarhálvuni. Ætlanin er, at kvøldseturnar kunnu verða eitt afturvendandi tiltak hvønn vetur, um komandi ráð taka undir við tí. Eisini hevur ráðið, í samstarvi við NÁM, framleitt poddar, sum kunnu nýtast sum undirvísingartilfar í miðnámsskúlum. Poddarnir eru upptiknir, men enn ikki liðugt framleiddir, og væntast at vera klárir í januar ella februar 2026. Harafturat vóru 16 lógaruppskot og kunngerðir sent ráðnum til hoyringar, og er hetta væl meira enn undanfarnu árini.

Stórur partur av arbeiðsorkuni fyrstu tíðina í 2025 fór tó við at seta ein nýggjan fakliga skrivara. Tað er framvegis eitt stórt ynski hjá ráðnum at fáa økta játtan til at seta ein fakligan skrivara í fulla tíð. Seinastu árini hevur virksemi ráðsins verið merkt av skiftandi skrivarum, og tíðarskeið har ímillum við ongum skrivara. Fjórði skrivarin í livitíð ráðsins, Katla Heðinsdóttir, var settur 1. maj. Undanfarni skrivarin legði frá sær 1. oktobur 2024, og Etiska ráðið hevur sostatt verið uttan skrivara í sjey mánaðar í 2024-2025. Tað er torført at halda fast í góðari arbeiðsmegi í einum hálvtíðarstarvi. Hetta er ikki ein nýggj avbjóðing, og sæst eisini aftur í, at Etiska ráðið fleiri ferðir fyrr hevur ynskt hægri starvsbrøk til fakliga skrivaran. At núverandi fakligi skrivarin longu er fjórði skrivarin hjá ráðnum, hóast ráðið bara hevur verið til í 7 ár, er eisini eitt greitt tekin um, at hetta er ein stór avbjóðing. Uttan støðuga arbeiðsorku ber illa til at byggja upp varandi vitan, førleikar og netverk, ið eru fortreytir fyri at kunna fremja arbeiðið á nøktandi hátt.

Summarið 2026 skal nýtt Etiskt ráð setast. Umframt eina ráðstevnu í apríl 2026, sum longu er undir fyrireiking, er ætlanin eisini at skipa fyri einari ráðstevnu í septembur 2026, soleiðis at nýggja ráðið fær møguleika at fóta sær uttan at ov long tíð gongur til fyrsta almenna virksemi.

Bergur Debes Joensen
Formaður

# Um Etiska ráðið

## Uppgávan hjá Etiska ráðnum

Etiska ráðið er sett at virka samsvarandi løgtingslóg nr. 70 frá 29. mai 2017 um Etiskt ráð.

Etiska ráðið skal fremja og styrkja kjak og vitan um etiskar spurningar, ið knýta seg til heilsufakligt virksemi á heilsuøkinum, almannaøkinum og kommunala økinum. Hetta verður m.a. gjørt við at skipa fyri ráðstevnum, evnisdøgum og kjakfundum fyri at varpa ljós á aktuellar etiskar spurningar.

Etiska ráðið skal ráðgeva løgtingi, landsstýrinum og almennum myndugleikum í etiskum spurningum. Etiska ráðið hevur skyldu til at fylgja menningini á tí bio- og ílegutekniska økinum og hevur til uppgávu at ráðgeva í etiskum spurningum viðvíkjandi gransking í og nýtslu av bio- og ílegutøkni.

Ráðið virkar óheft og velur sjálvt tey evnir og teir spurningar, tað tekur til viðgerðar. Tað er ikki krav, at Ráðið er samt í sínum niðurstøðum um ávís etisk evnir. Heldur er umráðandi at lýsa ávísu evnini úr ymiskum sjónarhornum, og búgva almenningin og tey, sum skulu taka støðu til tey ymsu evnini, til víðari kjak og støðutakan.

Ráðið skal lata úr hondum minst eina frágreiðing um árið.

## Setan av ráði og hvør situr í ráðnum

Í lóggávuni er ásett, at tað er landsstýrisfólkið í heilsu- og innlendismálum, sum setur limirnar í Etiska ráðnum. Etiska ráðið hevur níggju limir, ið verða settir fyri fýra ár í senn. Tilnevningin verður gjørd eftir ávísum reglum, soleiðis at landsstýrisfólkið í heilsu- og innlendismálum tilnevnir formannin í ráðnum, umframt ein lim. Harumframt tilnevnir landsstýrisfólkið í heilsu- og innlendismálum tríggjar limir eftir tilmæli frá landsstýrisfólkunum í ávikavist almannamálum, vinnumálum og mentamálum, ein lim eftir tilmæli frá Kommunufelagnum og tríggjar limir eftir tilmæli frá politisku flokkunum, ið hava umboð á løgtingi.

Tey, ið verða tilnevnd í ráðið, skulu hava innlit í etisk, mentanarlig, samfelagslig og faklig viðurskifti, ið hava týdning fyri virksemið hjá ráðnum. Limir í ráðnum kunnu ikki sita á løgtingi ella í kommunustýri.

Limirnir verða sitandi í ráðnum, til nýggir limir eru tilnevndir. Tá ið ráðið verður sett av nýggjum, verður miðað eftir, at í minsta lagi tríggir limir frá undanfarna valskeiði verða sitandi eitt valskeið afturat. Limir kunnu verða settir av nýggjum eina ferð.

Landsstýrisfólkið í heilsu- og innlendismálum skal tryggja, at ráðið verður samansett við fólki við fjølbroyttum útbúgvingum og royndum, og at umleið eins nógvir limir av báðum kynum eru umboðað.

## Ráðslimir



**Bergur Debes Joensen**
Sóknarprestur í Suðurstreymoyar prestagjaldi.

Tilnevndur formaður í 2022 av landsstýrismanninum í heilsumálum.



**Katrin Kallsberg**
Serlækni í gynækologi/obstetrik. Starvast sum lækni í kvinnusjúkum á Landssjúkrahúsinum.

Tilnevnd í 2022 av landsstýrismanninum í heilsumálum.



**Jógvan D. Hansen**
Cand.phil. Starvast sum lærari í heimspeki.

Tilnevndur í 2018 (seinna seta frá 2022) eftir tilmæli frá politisku flokkunum á løgtingi.



**Arni Zachariassen**
Cand.theol. Rúsviðgeri á Bláakrossheiminum.

Tilnevndur í 2022 eftir tilmæli frá politisku flokkunum á løgtingi.



**Súsanna Mortensen**
Námslektari í sjúkrarøktarfrøði. Starvast á Fróðskaparsetrinum.

Tilnevnd í 2022 eftir tilmæli frá politisku flokkunum á løgtingi.



**Jóngerð Guttesen**
Master of Public Governance. Starvast sum leiðari í Roðanum.

Tilnevnd í 2022 eftir tilmæli frá Kommunufelagnum.



**Magni Højgaard**
Sosialráðgevi. Starvast sum leiðari í RÓWT.

Tilnevndur í 2025 eftir tilmæli frá landsstýrismanninum í almanna- og mentamálum.



**Noomi Gregersen**
Cand.scient í mýlalívfrøði. Verkætlanarleiðari í Fargen.

Tilnevnd í 2022 eftir tilmæli frá landsstýrismanninum í vinnumálum.



**Marjun Asbjarnardóttir Lómaklett**
Sóknarprestur í Norðoya vestara prestagjaldi.

Tilnevnd í 2022 eftir tilmæli frá landsstýriskvinnuni í mentamálum.

# Fyrisiting

## Heilsumálaráðið

Heilsumálaráðið umsitur lógina, sum Etiska ráðið virkar eftir. Heilsumálaráðið er ovasti fyrisitingarligi myndugleiki hjá Etiska ráðnum, og veitir ráðnum løgfrøðiliga og aðra ráðgeving, tá ið tørvur er á tí. Heilsumálaráðið umsitur eisini bókhald og roknskap fyri Etiska ráðið.

## Formaður

Formaður fyri Etiska ráðið er Bergur Debes Joensen, sum tók við sessinum 1. oktober 2022. Formaðurin leiðir fundirnar í ráðnum, og tað er hann, sum úttalar seg alment vegna ráðið. Formaðurin fær samsýning sambært galdandi reglum.

## Reglugerðin

Etiska ráðið virkar eftir reglugerð, har ásett er, hvussu ráðið starvast samsvarandi § 6, stk. 7 í løgtingslóg um Etiskt ráð.

## Skrivstovan

Á skrivstovuni hjá Etiska ráðnum starvast fakligur skrivari hálva tíð. Uppgávan hjá skrivstovuni er at tæna Etiska ráðnum at røkja sína uppgávu, sum er at fremja og styrkja kjak og vitan um etiskar spurningar, ið knýta seg til heilsufakligt virksemi á heilsuøkinum, almannaøkinum og kommunala økinum, og at gera almennar myndugleikar og borgarar betur førar fyri at taka støðu í etiskum spurningum.

Fakligur skrivari frá 1. mai 2025 er Katla Heðinsdóttir, cand.mag. og ph.d. í heimspeki, sett í 2025 eftir tilmæli frá Etiska ráðnum.

Fakligi skrivarin leggur til rættis ráðsfundirnar saman við formanninum, og hevur um hendi dagliga virksemið á skrivstovuni.

Uppgávan er harumframt m.a. at savna inn tilfar og greina tilfarið fyri ráðið.

Etiska ráðið leigar høli til skrivstovu, fundir og annað virksemi í Varðagøtu 9, FO-100 Tórshavn.

## Etisk evni

Í 2025 hevur Etiska ráðið av sínum eintingum serliga arbeitt við fimm evnum:

- Berarakanningar
- Vitlíki
- Raðfestingar í almennum heilsutilboðum
- Fosturtøka eftir 12. viku
- Virkin deyðshjálp

Harafturat hevur ráðið arbeitt við málum, sum tað hevur fingið til hoyringar frá myndugleikunum í sambandi við lógararbeiði, og málum, sum fólk, feløg, miðlar og onnur hava heitt á ráðið um at taka upp.

### Berarakanningar

Etiska ráðið byrjaði árið við at runda arbeiðið við berarakanningum av. Talan er um kanningar, sum hava til endamáls at staðfesta, um einstaklingar eru berarar av onkrum av teimum álvarsomu ílegusjúkunum, sum hava øktan títtleika í Føroyum, og sum kunnu latast víðari til komandi ættarlið um bæði foreldrini eru berarar. Arbeiðið byrjaði eftir áheitan í 2023, og helt áfram í 2024, har Etiska ráðið gjørdi av at lata út eitt skriv, sum lýsir fyrimunir og vandar við berarakanningum. Í februar 2025 var hetta skriv almannakunngjørt, og um sama tíðarskeið var formaðurin, Bergur Debes Joensen, boðin í ein podd hjá Frihedsbrevet at skifta orð við forkvinnuna í áhugafelagnum Arvasjúkan, um júst berarakanningar av ílegusúkum. Seinni á árinum kom eitt uppskot um at seta á stovn fyrsta almenna tilboðið um berarakanningar av ávísum ílegusjúkum til ummælis frá Heilsumálaráðnum. Omanfyri nevnda skriv var viðheft hoyringarsvarinum frá ráðnum. Harumframt vóru berarakanningar evnið til eina Etiska kvøldsetu í januar 2026.

### Vitlíki

Tað var eisini í 2023 at hol var sett á evnið vitlíki, men stígur kom í arbeiðið í 2024, tá undanfarni fakligi skrivarin legði frá sær. Í mai 2025 var endiliga skipað fyri einari ráðstevnu um vitlíki og etikk innan heilsuverkið og almenna geiran í samstarvi við Fróðskaparsetur Føroya.

Vitlíki er eitt støðugt viðkomandi evni hjá ráðnum at hava eyga á. Tøknin mennist við stórari ferð, og inniber eina ørgrynnu av bæði fyrimunum og etiskt viðkvæmum avbjóðingum. Tað er tí gleðiligt, at Etiska ráðið var boðið til verkstovuna "etiskt og ábyrgdarfult vitlíki" hjá KT-landsins í samband við landsins forkanning til eina vitlíkis heildarætlan. Verkstovan varð hildin í desembur 2025, og Noomi O. Gregersen, ráðslimur, og Katla Heðinsdóttir, fakligur skrivari, luttóku sum umboð fyri ráðið. Arbeiðið við vitlíki fer ivaleyst at halda støðugt áfram komandi árini.

### Raðfestingar í almennum heilsutilboðum

Raðfestingar innan heilsuverkið hevur verið eitt afturvendandi evni hjá bæði hesum og undanfarna ráði. Ein ráðstevna um evnið hevur verið í tonkunum leingi, og í ár eydnaðist tað at fáa í lag. Í samstarvi við Sjúkrarøktaretiska ráðnum og Siðfrøðinevndini hjá felagnum Føroyskir sálarfrøðingar var ráðstevnan

hildin í septembur 2025. Ráðstevnan var væleydnað, og elvdi til nakað av umrøðu í miðlunum, har sjóneykan var sett á tørvin at gera tilvitaðar og gjøgnumskygdar raðfestingar á heilsuøkinum. Í londunum rundan um okkum hevur kjak um raðfestingar staðið á dagsskrá í fleiri áratíggju, men í Føroyum hevur evnið higartil fingið lítla ella onga rúmd, og vit hava hvørki felags tilmæli ella leiðreglur fyri, hvussu raðfestingar í heilsutilboðum skulu gerast. Tá vit ikki hava innlit í, hvussu raðfest verður, kunnu vit heldur ikki meta um, hvørt útbýtið av heilsutilfeingi fer fram á ein hátt, sum livir upp til tey virðir og rættvísiskrøv, vit annars seta í einum demokratiskum samfelagi. Við ráðstevnuni var ynskt at seta gongd á eitt opið og uppbyggjandi orðaskifti um raðfestingar og etiskar avbjóðingar á heilsuøkinum við serligum atliti til føroyska samfelagið.

## Fosturtøka eftir 12. viku

Í sambandi við at uppskot til nýggja fosturtøkulóg var til viðgerðar í løgtinginum enn einaferð, var tað ein viðkomandi spurningur um Etiska ráðið skuldi seta sjóneykuna á fosturtøkumálið aftur í ár. Eftirsum evnið varð nógv viðgjørt í sambandi við fyrsta uppskot til fosturtøkulóg í 2023, var ráðið tó av tí meting, at har ikki var nógv at leggja afturat viðgerðini av kjarnuspurninginum, nevniliga fría fosturtøku áðrenn 12. viku av viðgongutíðini. Tó eru aðrir etiskt áhugaverdir spurningar viðkomandi fyri lógaruppskotinum, herundir teir grundgevingar, sum sambært uppskotinum kunnu loyva fosturtøku *eftir* 12. viku av viðgongutíðini. Tað varð tí avgjørt at høvunda eina grein um etiskar tvístøður í fosturtøku eftir 12. viku, við útgangsstøði í teimum grundgevingunum, sum eru nevndar í lógaruppskotinum. Greinin var útgivin á portalinum hjá Sosialinum í novembur 2025.

## Virkin deyðshjálp

Seinastu árini er virkin deyðshjálp – í ymiskum skapum og undir ávísum treytum - vorðin ein møguleiki í fleiri londum í vesturheiminum. Fyrst í Hollandi og Belgia í 2002, og nú teljast m.a. Kanada (2016), Spania (2021), Ný Sæland (2021), Eysturríki (2022) og fleiri statir í USA eisini uppí. Í grannalondum okkara verður evnið viðgjørt við jøvnum millumbilum, og eitt nú hevur danska stjórnin fyrr í heyst sett niður ein arbeiðsbólk at kanna og viðgera møguleikarnar fyri virknari deyðshjálp í Danmark. Etiska ráðið metir tað at vera týdningarmikið, at Føroyar og føroyingar viðgera evni proaktivt við útgangsstøði í Føroyska samfelagnum. Eitt nú kann vandin fyri einari óhepnari glíðibreyt ella sosialum pressi hava eina øðrvísi tyngd í smáum samfeløgum, og tí er blind yvirtøka av lóggávu aðrastaðnis frá neyvan besti vegurin fram. Í løtuni fylgja Føroyar donsku revsilógini, har virkin deyðshjálp sambært § 239 og 240 er revsiverd. Tó er sokallað passiv deyðshjálp, sum fevnir um ikki at seta í verk lívsleingjandi viðgerð, ella at geva pínulinnan sum kann framskunda deyðan, ikki revsiverd.

Á heysti 2025 setti Etiska ráðið hol á at viðgerða nakrar av etisku kjarnuspurningunum, sum knýta seg til virkna deyðshjálp. M.a. er ein ráðstevna, sum skal haldast í apríl 2026, í umbúna. Yvirskipaði spurningurin til ráðstevnuna verður: Hvørji atlit hava týdning, tá støða skal takast til, um virkin deyðshjálp eigur at gerast ein møguleiki í Føroyum?

Etiska ráðið ynskir at seta hetta evnið á breddan í góðari tíð, so at myndugleikar og borgarar kunnu vera betur før fyri at taka støðu, um ella tá spurningurin um virkna deyðshjálp verður politiskt áleikandi.

# Innkomin mál

## Hoyringarmál

Etiska ráðið fekk í 2025 16 lógaruppskot og kunngerðir til hoyringar, sum er væl meira enn 2024. Etiska ráðið hevði skrivligar viðmerkingar til fimm teirra. Hoyringarsvarini eru at finna á heimasíðuni hjá ráðnum. Annað tilfar í sambandi við málini er at finna á heimasíðunum hjá Føroya Løgtingi, Løgmansskrivstovuni og avvarðandi ráðum.

*Løgtingslóg um sjúkrahúsverkið (ásetingar um universitetssjúkrahús)*

Uppskotið var sent til ummælis 18. desembur 2024, við ummælisfreist 15. januar 2025. Etiska ráðið hevði ongar viðmerkingar til uppskotið.

*Ríkislógartilmæli um eftirgjørdan gitnað*

Uppskotið varð av missgávum ikki sent Etiska ráðnum, tá uppskotið var í almennari hoyring í novembur-desembur 2024. Ístaðin var Etiska ráðið bjóðað til fund við Trivnaðarnevndini 27. mars, og orðaði síðan eitt hoyringarsvar, sum varð sent nevndini 8. apríl 2025. Nevndin hevði eftir fundin eyka spurningar til ráðið, og ráðið orðaði tá eitt uppskot til eitt ískoyti til hoyringarsvari. Hetta ískoyti varð tó ongantíð sent trivnaðarnevndini, av tí at lógin bleiv samtykt áðrenn ískoytið bleiv liðugt.

*Løgtingslóg um revsing og løgtingslóg um frástøðuboð*

Uppskotið var sent til ummælis 13. januar 2025. Hoyringarsvar varð sent 13. februar 2025.

*Kunngerð um sálarligt arbeiðsumhvørvi*

Uppskotið varð sent til ummælis 31. mars 2025. Etiska ráðið hevði ongar viðmerkingar til uppskotið.

*Kunngerðir í sambandi við lóg um at skipa heilsutænastur í nærumhvørvinum hjá borgaranum*

Uppskotið varð sent til ummælis 10. apríl 2025. Etiska ráðið hevði ongar viðmerkingar til uppskotið.

*Bekendtgørelse for Færøerne om behandlingstestamenter*

Uppskotið varð sent til ummælis 11. apríl 2025. Etiska ráðið hevði ongar viðmerkingar til uppskotið.

*Løgtingslóg um sterilisatión og kastratión (Sterilisatiónslógin)*

Uppskotið var sent til ummælis 1. juli 2025. Hoyringarsvar varð sent 11. august 2025. Etiska ráðið var boðin í fund í Løgmálaráðnum 25. mars at umrøða ætlaða endurskoðanina av lógini. Tríggir ráðslimir umboðaðu ráðið á fundinum.

*Ríkislógartilmæli um virkisøkini hjá sjúkrarøktarfrøðingum, ljósmøðrum og tannrøktarum*

Uppskotið varð sent til ummælis 3. juni 2025. Etiska ráðið hevði ongar viðmerkingar til uppskotið.

*Kunngerð um Heilivágsráðið*

Uppskotið varð sent til ummælis 2. juli 2025. Etiska ráðið hevði ongar viðmerkingar til uppskotið.

*Løgtingslóg um almannapensjónir o.a.*
Uppskotið varð sent til ummælis 12. august 2025. Etiska ráðið hevði ongar viðmerkingar til uppskotið.

*Løgtingslóg um sjúkrahúsverkið (berarakanning)*
Uppskotið var sent til ummælis 25. septembur 2025. Hoyringarsvar varð sent 22. oktobur 2025, og ein eyka viðmerking var send 24. oktobur 2025.

*Kunngerð um støði, viðlíkahald, rakstur, tól, amboð, innbúgv o.a. í heilsumiðstøðum.*
Uppskotið varð sent til ummælis 25. septembur 2025. Etiska ráðið hevði ongar viðmerkingar til uppskotið.

*Løgtingslóg um yvirvøku við vakmyndatóli*
Uppskotið var sent til ummælis 8. oktobur 2025. Hoyringarsvar varð sent 5. novembur 2025.

*Bekendtgørelse for Færøerne om jordemødres forbeholdt virksomhedsområde*
Uppskotið varð sent til ummælis 3. novembur 2025. Etiska ráðið hevði ongar viðmerkingar til uppskotið.

*Bekendtgørelse for Færøerne om sygeplejerskers forbeholdt virksomhedsområde*
Uppskotið varð sent til ummælis 3. novembur 2025. Etiska ráðið hevði ongar viðmerkingar til uppskotið.

*Uppskot til kunngerð um meting av foreldraførleika í sambandi við viðgerð fyri barnloysi*
Uppskotið varð sent til ummælis 3. novembur 2025. Etiska ráðið hevði ongar viðmerkingar til uppskotið.

## Mál frá borgarum o.ø.

*Heimahjálp*
Ein borgari vendi sær til Etiska ráðið við einum hjartasuffi. Støðan snýr seg í stuttum um, at maður borgarans hevur tørv á heimahjálp, men at heimahjálpin sendir millum 15 og 19 ymisk fólk á gátt – og um summarið enn fleiri, herundir miðnámsskúlanæmingar. Stóra talið av ymiskum fólkum ger relatiónina til hjálpina óstøðuga og skapar manglandi tryggleika. Ráðslimirnir vóru samdir um, at støðan er óheppin, og at øll hjálp í heiminum eigur at vera meira stabil og trygg. Hetta er ikki ein hvørki nýggjur ella ókendur trupulleiki. Yvirskipaði spurningurin er tó, um áheitanin inniber eina etiska síðu ella tvístøðu, sum Etiska ráðið kundi viðgjørt nærri. Ein trímannaður arbeiðsbólkur var settur at viðgera málið nærri. Samanumtikið er svarið nei. Viðkomandi trupuleikarnar og tvístøðurnar snúgva seg einamest um fyrisiting, organisering og tilfeingisbýti. Hóast tað er etiskt viðkomandi, at ein borgari kennur seg ótryggan orsaka av stórari útskifting í heimahjálpini, er slík útskifting eitt úrslit av fleiri faktorum, sum m.a. hava við skipan av arbeiðsplássinum, vantandi arbeiðsmegi og tílíkt at gera. Ein viðkomandi vinkul hjá ráðnum kundi verið tann meira yvirskipaði spurningurin um politiska raðfesting av heilsutilboðum, men sum einkultmál ella sum avmarkað mál um útskifting í heimahjálpini, er ivasamt um Etiska ráðið eigur ella kann viðgerða tað nærri. Avgjørt varð at formaðurin, som borgarin hevði vent sær til munnliga, greiddi frá støðuni hjá ráðnum og vísti til annan felagsskap, sum var betri fyri og sinnaður at taka málið upp.

*Surrogati*
Ein fyrispurningur kom frá einum borgara viðvíkjandi hugburðin føroyingar hava til flóttafólk.

Etiska ráðið fekk eina áheitan frá einum borgara um at fyrihalda seg til tann mismun, sum borgarin helt at børn, sum eru fødd við hjálp av surrogati uttanlanda, eru fyri. Málið snýr seg í stuttum um, at slík børn bert hava rætt til eitt foreldur (biologiski pápin), kunnu ikki arva mammu sína, og mamman fær ongan barsil. Ráðið viðgjørdi spurningin á ráðsfundi í apríl 2025.

Ráðið metir, at øll børn, óansæð uppruna og tilgongd, eiga at verða tryggjað grundleggjandi rættindi og vernd. Samstundis liggur málið uttanfyri tað heilsufakliga virksemi, sum viðgerðir hjá Etiska ráðnum má halda seg innanfyri. Hóast sjálvt evnið surrogati sjálvandi er partur av heilsufakliga økinum, snúði fyrispurningurin seg um rættindi hjá børnum og foreldrum aftaná barnsburðin, og hoyrir hetta undir almannaøkið. Av hesari orsøk, var tað avmarkað, hvussu nógv Etiska ráðið kundi viðgera júst hendan spurningin. Tó frættist, at nýggj føroysk barnalóg er í gerð. Tað er í donsku barnalógini at børn fødd við surrogati eru fevnd, og tí kann man ímynda sær at føroyska barnalógin kundi fevnt um hetta eisini. Etiska ráðið verður væntandi ein hoyringspartur, tá lógin skal til hoyringar, eftir ætlan fyrst í 2026. Um hetta hendir, fer Etiska ráðið at viðgera um og hvussu hoyringarsvarið skal nevna rættindini hjá børnum og foreldrum í samband við surrogati.

### *Sjónligar trúar-, politiskar ella ideologiskar markørar á fakligum umboðum hjá almennum stovnum*

Ein áheitan kom frá einum borgara til Etiska ráðið um at fyrihalda seg til, hvussu faklig umboð hjá almennum stovnum eiga at føra seg fram í miðlunum, tá talan er um sjónligar trúar-, politiskar ella ideologiskar markørar (t.d. boðskap á klæðum). Spurningurin snýr seg serliga um, hvussu slíkir markørar kunnu ávirka borgarans uppliving av óheftni, inklusjón og institutionellum legitimiteti, serliga á økjum har viðkvæm evnir verða viðgjørd.

Yvirskipaði spurninurin um sjónligar markørar av ymsum slag á fakligum umboðum hjá almennum stovnum, hóast áhugaverdur og viðkomandi, verður mettur at liggja uttanfyri virkisøkið hjá Etiska ráðnum í núverandi støðu. Tó er meira avmarkaði spurningurin um, hvussu limir í Etiska ráðnum eiga at fyrihalda seg til slíkar markørar hjá sær sjálvum, tá teir traðka fram í miðlum, sera viðkomandi at taka støðu til hjá ráðnum. Hetta evnið verður tikið upp á fyrsta fundi í 2026.

# Virksemi

## Ráðstevna: Vitlíki og etikkur í heilsuverkinum og almenna geiranum

Almenna ráðstevnan var hildin í Kongshøll 28. Maj 2025 í samstarvi við Fróðskaparsetrinum. Ráðstevnan vendi sær til øll við áhuga fyri vitlíki. Høvuðsnavni á ráðstevnuni var Helga Brøgger, granskari í vitlíki úr Noregi, sum helt framløgu við heitinum "Hvordan skrur jeg på fremtiden? Forsvarlige helsetjenester med KI". Aðrar framløgur vóru hildnar av Mariu Hammer Olsen, Noomi O. Gregersen, Marjun Lómaklett, Martin T. Zachariasen og Martin Mohr Olsen. Martin Zachariasen, Regin Berg, Jana Mortensen og Noomi O. Gregersen luttóku í pallborðsfundi til endans. Ráðstevnan var væl vitjað, og taldi umleið 80 áhoyrarar.

## Ráðstevna: Raðfestingar í almennum heilsutilboðum: Hvat er rætt og rættvíst at gera?

Almenna ráðstevnan var hildin í Norðurlandahúsinum 8. Septembur 2025 í samstarvi við Sjúkrarøktaretiska ráðið og Siðfrøðinevndini hjá felagnum Føroyskir sálarfrøðingar. Ráðstevnan hevði til endamáls at birta í kjak um raðfestingar av heilsutilboðum innan almenna geiran, og at varpa ljós á týdningin av gjøgnumskygni og rættvísi í raðfestingarprosessum. Høvuðsnavnið á ráðstevnuni var Kjeld

Møller Pedersen, professari í heilsubúðskapi á Syddansk Universitet, sum tosaði um royndir á økinum í Danmark, Noregi og Onglandi. Aðrar framløgur vóru hildnar av Sirið Stenberg, Hjørdis Mortensen, Pál Weihe, og Jógvan D. Hansen, og ráðstevnan endaði við einum pallborðskjaki. Ráðstevnan var sera væl vitjað, og nógv fleiri enn tey upp til 100 fólkini, sum ráðini høvdu væntað, komu at lurta.

## Etiskar kvøldsetur

Veturin 2025-2026 skipar Etiskar ráðið á fyrsta sinni fyri etiskar kvøldsetur. Kvøldseturnar vera hildnar fyrsta týsdag í hvørjum mánaði í vetrarhálvuni í KFUK-húsinum, og eru ein roynd at røkka endamálinum í § 1 í løgtingslóg um etiskt ráð, nevniliga at fremja og styrkja kjak og vitan um etiskar spurningar. Skráin fyri veturin 2025-2026 er hendan:

7. oktobur: Demokrati
4. novembur: Polarisering
2. desembur: Breitt samtykki í heilsugransking
6. januar: Berarakanningar
3. februar: Dumhet, idioti og dumme idioter (við norska heimspekinginum Lars Fr. H. Svendsen)
3. mars: Sosialur ójavni í heilsu

Fyrsta kvøldsetanin var skipað í samstarvi við Føroya fólkaháskúla, og var endurtikin í Runavík eftir áheitan frá Runavíkar kommunu. Tað bar tíverri ikki til at endurtaka nakrar av hinum kvøldsetunum her ella aðrastaðnis. Næsta ár hevði verið gott at hugsa meira um staðseting ella møguleika fyri upptøku ella stroyming fyri at økja um møguleikan fyri borgarum uttanfyri Havnina at luttaka. Avbjóðingin er tó, at spurningar og kjak taka upp stóran part av hesum kvøldunum, og slíkt egnar seg ikki væl til stroyming ella upptøku, bæði av tøkniligum orsøkum, og tí at hetta kann avmarka hugin hjá áhoyrarum at luttaka. Ein onnur avbjóðing er fíggjarligi karmurin, sum hvørki loyvir professionella upptøku hesu kvøldini, ella útreiðslur til leigu av hølu o.a. Sum partur av leigusáttmálanum við KFUK, fæst stóra hølið hjá teimum ókeypis til hesi tiltøkini, og kvøldseturnar eru sostatt myndaðar við tí fyri eyga, at tær ikki kosta meira enn útreiðslurnar til kaffi/te og okkurt søtt afturvið.

## Poddar um etikk til miðnámsskúlanæmingar

Í samstarvi við NÁM vóru seks partar av nýggjum poddi framleiddir í septembur-oktobur. NÁM tók sær av tí tekniska viðvíkjandi fremleiðslu, og bar bróðurpartin av fíggjarliga kostnaðin, meðan innihaldið í poddunum var framleitt av ráðslimunum Jógvan D. Hansen og Arna Zachariassen. Poddarnir eru upptiknir, men enn ikki liðugt framleiddir, og væntast at vera klárir í januar ella februar 2026.

Poddarnir vóru framleiddir eftir áheitan frá miðnámsskúlalærarum í átrúnaði. Ynskið var, at poddarnar kunnu nýtast sum tilfar í undirvísingarhøpi, og ein listi við ynsktum evnum, sum kunnu lýsast úr etiskum sjónarhornum, var útflýggjaður ráðnum. Gjørt var av, at byrja poddvarpsrøðina við trimum pørtum um etiskt ástøði, og hesar partar lýsa ávikavist konsekvensetikk, pliktetikk og dygdaretikk. Harumframt vóru trý evnir úr listanum valdir, og teir seinastu tríggir partarnir snúgva seg sostatt um kyn og kynssamleika, náttúruetikk og vitlíki. Ætlanin er at vita, hvussu væl teir fyrstu seks partarnir rigga, og so at framleiða enn fleiri við møguligum tilrættingum.

# Fakligt samstarv

Etiska ráðið skal sambært lógini samstarva við onnur etisk ráð og etiskar nevndir. Gott samstarv hevur verið hetta árið við Sjúkrarøktaretiska ráðið (SER) og siðfrøðinevndina hjá felagnum Føroyskir sálarfrøðingar (SÁL) við at skipa fyri ráðstevnuni um raðfestingar í almennum heilsutilboðum í septembur. Harafturat eru fyrireikingarnar longu byrjaðar fyri eina nýggja ráðstevnu í apríl 2026, sum skal snúgva seg um virkna deyðshjálp. Avtalað er, at hava ein árligan fund við forfólkunum úr hesum trimum ráðunum, og fakliga skrivaran hjá Etiska ráðnum, har vit kunna hvønn annan um okkara virksemi, og stuðla framtíðar samstarvi. Næsti fundurin verður í februar 2026.

# Útgávur og miðlan

## Ársfrágreiðing 2024

Etiska ráðið gav í august 2025 út *Ársfrágreiðing 2024*.

## Etiska ráðið í miðlum

Etiska ráðið hevur á ymsan hátt verið í miðlunum í 2025:

### *Berarakanningar*

Skrivið "Etiskir spurningar við atliti til berarakanningar fyri álvarsligar arvaligar sjúkur" varð útgivið 5. februar á portalinum hjá Sosialinum, og kann eisini finnast á facebook vanganum og á heimasíðuni hjá Etiska ráðnum.

Eisini var formaðurin í Etiska ráðnum boðin í poddin "Frí mikrofon" hjá Frihedsbrævinum 20. Februar 2025, at skifta orð um berarakanningar.

### *Ráðstevna um vitlíki*

Samrøða var við høvuðsnavnið á ráðstevnuni, Helgu Brøgger, í útvarpstíðindunum 28. Mai 2025.

### *Ráðstevna um raðfestingar í almennum heilsutilboðum*

Ráðstevnan var umrødd í Breddanum 12. septembur 2025, sum hevði eina heila sending um evnið. Prátað var m.a. við Kjeld Møller Pedersen, heilsubúskaparfrøðing, Jógvan D. Hansen, lærara í heimspeki og lim í Etiska ráðnum, og Janu Mortensen, forkvinnu í sjúkrarøktaretiska ráðnum, sum øll luttóku í ráðstevnuni. Eisini vóru forfólkini í teimum trimum samskipandi ráðunum á vitjan í Góðan Morgun Føroyar 8. Septembur 2025.

### *Fosturtøka*

Í sambandi við uppskotið til nýggja fosturtøkulóg, vóru formaðurin í Etiska ráðnum, Bergur Debes Joensen, og ráðslimirnir Jógvan D. Hansen, Katrin Kallsberg og Noomi O. Gregersen í Breddanum "Fosturtøkulógin aftur fyri tingið" 23. Septembur 2025.

#### *Fiksirúm*

Í sambandi við øktu nýtsluna av sproytum sum miðil til rús, viðgjørdu miðlarnar í oktobur spurningin um, hvørt eitt fiksirúm eigur at vera sett á stovn í Føroyum. Í tí sambandi var ráðslimurin Magni Højgaard boðin í Dag og Viku 21. oktobur, og formaðurin í Etiska ráðnum tann 24. oktobur 2025.

#### *Etiskar tvístøður í fosturtøku eftir 12. viku*

Greinin varð útgivin á portalinum hjá Sosialinum tann 11. novembur, og kann eisini finnast á facebook vanganum og á heimasíðuni hjá Etiska ráðnum.

### Heimasíðan

Heimasíðan hevur so hvørt verið dagførd í 2025. Nýtt tilfar, tíðindi, og upptøkur frá tiltaki vóru løgd út á heimasíðuna. Tó er heimasíðan nakað stirvin, og er ikki broytt síðan 2018. Ein menning av heimasíðuni verður raðfest í 2026.

### Facebook

Ráðið hevur í nøkur ár havt sín egna vanga á Facebook, og hevur so hvørt lagt kunnandi tilfar út á síðuna í 2025.

## Fundarvirksemi

Etiska ráðið hevði 9 ráðsfundir í 2025, og fleiri fundir vórðu hildnir í arbeiðsbólkum, m.a. í sambandi við fyrireikingunum av ráðstevnunum og kvøldseturnar.

## Luttøka uttanhýsis

Etiska ráðið var boðið til verkstovuna "etiskt og ábyrgdarfult vitlíki" hjá KT-landsins í samband við landsins forkanning til eina vitlíkis heildarætlan. Verkstovan varð hildin í desembur 2025, og Noomi O. Gregersen, ráðslimur, og Katla Heðinsdóttir, fakligur skrivari, luttóku sum umboð fyri ráðið.

## Fyrisitingin

### Skrivstovuhøli

Etiska ráðið leigar framvegis í KFUK-húsinum, Varðagøta 9, Tórshavn. 1. desembur flutti Vísindasiðsemisnevndin inn, og fakligi skrivarin hjá báðum stovnum deila nú kontór í hølunum.

### Fíggjarstøða

Játtanin til 2025 var 649.000 kr. Av tí at ongar útreiðslur vóru til løn til fakligan skrivara fyrstu fýra mánaðirnir, var fíggjarstøðan í 2025 ikki ørkymlandi. Við ársenda var sostatt eitt avlop uppá einar 70.000 kr., sum tó er minnið enn útreiðslurnar til ein fakligan skrivara í fýra mánaðir. Í 2026 kann tí væntast, at fíggjarligu karmarnar vera meira strongdir. Tó linkast teir av, at Vísindasiðsemisnevndin nú deilir hølini hjá Etiska ráðnum, og tí eisini húsaleiguna. Eisini er ætlanin at styrkja um samstarvið við aðrar stovnar, eitt nú sjúkrarøktaretiska ráðið í sambandi við komandi ráðstevnu, sum kann innibera at fíggjarliga byrðan av tiltøkum kann leggjast á fleiri herðar.

Etiska ráðið hevur í longri tíð ynskt sær eitt gjaldskort. Fíggjarligu karmarnar røkka ikki til at lýsa fyri øllum tiltøkum í miðlum og portalum, og tí er møguleikin at 'boosta' tiltøk á facebook eitt gott og bíligt alternativ, sum kann tryggja at almennu tiltøkini hjá ráðnum koma so breitt út til Føroya fólk sum gjørligt. Tó er ikki gjørligt at gera slíkar boostingar uttan eitt gjaldskort, og enn er eingin møguleiki fyri at nýta eitt nú gjaldskorti hjá Heilsumálaráðnum fingin til vegar. Hetta er ein týðandi avmarking hjá ráðnum í mun til at røkka sínum lógarbundna endamálið, og ráðið endurtekur tí sítt ynski um eitt gjaldskort – ella bert atgongd til eitt gjaldskort – enn einaferð.

## Ætlanir 2026

Í 2026 fer Etiska ráðið av álvara í holt við at viðgera etisku tvístøðurnar í virknari deyðshjálp. Ein ráðstevna er í umbúna, og ætlanin er at seta sjóneyku á evnið á aðrar mátar eisini. Harafturat verður orka lagt í at menna heimasíðuna, sum ikki er stórvegis broytt síðani Etiska ráðið varð sett fyrstu ferð í 2018. Málið um at styrkja leiklutin hjá ráðnum í almenna tilvitinum heldur áfram, og arbeitt verður tí víðari við m.a. Etisku kvøldsetrunum og poddunum. Harafturat fegnast ráðið um øll lógauppskot, sum vera send til ummælis, og tær áheitarnir, vit annars fáa.

Summarið 2026 skal nýtt Etiskt ráð setast. Í tí sambandi er ætlanin at skipa fyri einari ráðstevnu í septembur 2026, soleiðis at nýggja ráðið fær møguleika at fóta sær uttan at ov long tíð gongur til fyrsta almenna virksemi. Hendan ráðstevnan kundi verið ein uppfylging uppá ráðstevnuna um raðfestingar, sum tey trý samskipandi ráðini hava tosað um. Hetta er tó enn ikki avgjørt. Somuleiðis er ætlanin at byrja skipanina av Etisku kvøldsetrunum 2026-2027 í summar, soleiðis at hesar kunnu fara av bakkastokkið uttan ov nógv arbeiðið hjá nýggja ráðnum.

## Samanumtøka

Etiska ráðið hevur verið virkið á ymsan hátt hetta árið. Tvær ráðstevnur, ein røð av Etiskum kvøldsetum, poddar og greinar eru latin av hondum, umframt vanligt fundarvirksemi, hoyringarsvar, áheitanir, o.a. Ráðið hevur í ár serliga arbeitt við berarakanningum, vitlíki, raðfestingar, fosturtøku og virkna deyðshjálp.

Árið 2025 hevur verið merkt av øktari orku lagt í almennum tiltøkum. Tað er ynskið hjá ráðnum at vera viðkomandi og sjónlig í almenninginum, og ráðið fer framhaldandi at savna seg um hetta í 2026. Tó er tað ein áhaldandi avbjóðing at fakligi skrivarin ikki fær hægri arbeiðsbrøk, serliga fyri virksemi ráðsins í framtíðini. Týðandi stígar koma í arbeiðið hvørja ferð fakligi skrivarin skal skiftast út. M.a. fara nógvir arbeiðstímar við at læra seg tær ymsu fyrisitingarligu uppgávurnar av nýggjum, og uppbygd vitan og handalag gleppur ráðnum av hondum oftari, tá nýggjur persónur javnan skal setast, sum eisini sæst aftur í undanfarn ársfrágreiðingunum. Tað hevði verið til stórt gagn fyri virksemi ráðsins, um eitt fulltíðarstarv varð raðfest.

ETISKA RÁÐIÐ

Talið 3 umboðar ávísa rútmu, - lívsins rútmu.
Byrjan – miðja – endi. Skapan – lív – deyði. Fortíð – nútíð – framtíð.

Etiska ráðið viðger evnir, har tað sum oftast ikki eru eintýtt svar og har evnir kunnu síggjast úr ymsum sjónarhornum. Soleiðis ímyndar búmerkið arbeiðið hjá Etiska ráðnum.